# Viðskiftatreytir

## Vinnuligt Fríhald

Hetta skjal greiðir frá viðskiftatreytunum, sum eru galdandi fyri vinnuligu fartelefonhaldini, hereftir nevnt Fríhald, ið Føroya Tele veitir vinnukundum sínum. Viðskiftatreytirnar eru galdandi frá 25. januar 2019.
Viðskiftatreytirnar eru sertreytir í mun til Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele. Um samsvar ikki er millum hesar viðskiftatreytir og Almennu Viðskiftatreytirnar, eru tað hesar, sum eru galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele galdandi.

### Øll Fríhald

Fyri ein fastan mánaðarligan kostnað fært tú hetta í øllum Fríhaldunum:

- Óavmarkað tala í Føroyum.
- Óavmarkað sms í Føroyum.
- Avmarkað datanøgd í Føroyum.

### Fríhald 8GB og 16GB

Umframt óavmarkaða talu og sms og eina avmarkaða datanøgd í Føroyum, fært tú hvønn mánað hesar tænastur við í Fríhald 8GB og Fríhald 16GB:

- ReikaSumHeima í øllum Evropa og Ísrael
    - Tosa í mesta lagi 20 tímar úr Føroyum og til alt Evropa og Ísrael.
    - Tosa í mesta lagi 20 tímar í og úr øllum Evropa og Ísrael og ímillum galdandi lond.
    - 1000 sms í alt at senda báðar vegir.
    - Brúka alt íroknað data, sum haldið inniheldur, í øllum Evropa og Ísrael.

### Fríhald 32GB og 52GB

Umframt óavmarkaða talu og sms og eina avmarkaða datanøgd í Føroyum, fært tú hvønn mánað hevur tænastur við í Fríhald 32GB og Fríhald 52GB.

- ReikaSumHeima í øllum Evropa og Ísrael.
    - Tosa í mesta lagi 40 tímar úr Føroyum og til alt Evropa og Ísrael.
    - Tosa í mesta lagi 40 tímar í og úr øllum Evropa og Ísrael og ímillum galdandi lond.
    - 1000 sms í alt at senda báðar vegir.
    - Brúka alt íroknað data, sum haldið inniheldur, í øllum Evropa og Ísrael.

- ReikaSumHeima í USA, Kanada, Kina og Russlandi
    - Tosa í mesta lagi 40 tímar úr Føroyum og til USA, Kanada, Kina og Russland.
    - Tosa í mesta lagi 40 tímar í og úr USA, Kanada, Kina og Russland og ímillum galdandi lond.
    - 1000 sms í alt at senda báðar vegir.
    - Brúka alt íroknað data, sum haldið inniheldur, í USA, Kanada, Kina og Russland.

## Serlig viðurskifti

Óavmarkaða nýtslan kann ikki nýtast til sertænastur og yvirtakseraðar tænastur.

- **Tala**
    - Samrøður, ið verða avroknaðar, verða avroknaðar fyri hvønn byrjanarminutt. Óavmarkaða nýtslan fyri hvørja einstaka samrøðu er bert galdandi fyri samrøður upp til ein tíma.
    - Um farið verður upp um ein tíma, verður yvirnýtslan avroknað til vanligan minutttakst í Føroyum og vanligan reikingarkostnað uttanlands.
    - Rátt verður til at leggja á og ringja uppaftur.
- **Data**
    - Datanýtsla verður avroknað fyri hvørji 30 Kbit.
    - <u>Datanýtsla í Føroyum:</u>
        - Tá íroknaða datanøgdin er uppi, fært tú eina fráboðan við sms, samstundis sum vit lækka ferðina á netinum.
        - Hóast ferðin lækkar, fært tú kortini brúkt netið til tey mest átrokandi ørindini; so sum at lesa teldupost.
        - Ongin meirkostnaður stendst av nýtsluni, eftir at ferðin er lækkað.
    - <u>Datanýtsla uttanlands:</u>

- Tá íroknaða datanøgdin er uppi, fært tú eina fráboðan við sms. Eftir at íroknað data er uppi, verður vanligur reikingartakstur uppkravdur.
- Ert tú í einum landi, sum ikki er galdandi í ReikaSumHeima, eru vanligir takstir galdandi. Sí prísir her.
- Um tú fórt upp um íroknaðu datanøgdina, meðan tú vart uttanlands, lækkar ferðin á netinum, tá tú kemur heim til Føroya.
- Møguligt er at keypa eyka datapakkar til Fríhaldini.
- Sí lond í ReikaSumHeima her.
- Datanøgdin, sum er íroknað Fríhaldunum, kann einans nýtast í einum galdandi ReikaSumHeima-landi.
- Fylgjast kann við nýtsluni í Vinnurúminum ella Sjálvgreiðsluni, og eisini ber til at senda SAL til 1441.

Føroya Tele tekur fyrivarni fyri veiting av Fríhald, um samlaða avtalugrundarlagið hjá viðskiftafólkinum við Føroya Tele er ov lágt. Upplýsingar um hald og kostnaðir eru at finna á heimasíðu okkara her.

## Dragurenta og áminningargjald

Rindar viðskiftafólkið ov seint, hevur Føroya Tele rætt til at krevja dragurentu av rokningarupphæddini frá gjaldkomudegnum og til goldið verður, og at krevja áminningargjald fyri hvørja áminning, ið verður send fyri ov seint goldna tænastu.

## Brekfráboðan

Miðað verður ímóti, at rætting av breki er byrjað innan 3-5 dagar frá tí, at Føroya Tele hevur móttikið eina brekfráboðan frá viðskiftafólkinum. Arbeiðstíðin er frá kl. 8-16 gerandisdagar. Fráboðast kann á tel. 809047 alt samdøgrið.

## Broytingar

Broytingar, ið sum heild eru til fyrimuns fyri viðskiftafólkið, kunnu setast í verk beinanvegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar, við undantaki av príshækkingum smb. §6 í Almennu Viðskiftatreytunum, kunnu setast í verk við minst ein mánað ávaring til eitt mánaðarskifti.